Alternativið til kjarnorkuverkini:

Ensk stórfyritøka vil keypa ravmagn úr Íslandi via Føroyar



Íslendska útvarpið greiddi í gjár frá, at enska stórfyritøkan North Venture Ltd. hevur bjóðað sær at keypa 12 ferðirnar so nógv ravmagn úr Íslandi, framleitt verður har í løtuni. Oddamaðurin hjá hesi fyritøku, M. Copson, ið er serfrøðingur innanfyri altjóðafígging, sigur, at ætlanin er at leggja undirsjóvarkaðal til Skotlands via Føroyar, treytað av loyvi frá føroyska landsstýrinum. Copson kemur til Íslands í næstum saman við nøkrum bretskum orkuserfrøðingum til at samráðast við SEV í Íslandi (Landsvirkjun), íslendska ídnaðarráðið og ráðharrar í íslendsku stjórnini. Tey tøl, Copson longu hevur nevnt í samband við keyp av íslendskari orku, eru so ótrúlig, at íslendingar vita ikki enn, um teir skulu taka henda enska fíggjarserfrøðingin í álvara. Talan er um ikki minni enn 10 gigawatt, sum eru umleið tann orkunøgd, íslendingar kundu framleitt, um teir troyttu allar áir, fossar og vøtn og harumframt dampin frá øllum farmakeldum í landinum. Í royndum samsvarar hetta orkuni, sum 8 stór bretsk kjarnorkuverk framleiða í løtuni.

Íslendska útvarpið og íslendsku fjølmiðlarnir hava teir seinastu dagarnar sett í verk eina umfatandi gransking av North Venture Ltd. Tað hevur víst seg, at talan er um eina stóra fyritøku, ið hevur gjørt seg serkøna innanfyri alternativar orkuspurningar, eitt nú sólorku. Fyritøkan hevur stóra fíggjarmegi og hevur gjørt seg galdandi á nógvum økjum innanfyri bretska orkuídnaðin. Copson sigur, at endamálið hjá fyritøkuni er at beina fyri bretska kjarnorkuídnaðinum við at fáa til vega bíliga orku, ið ikki hevur við sær dálking av umhvørvinum. Undir kanningini, sum íslendsku fjølmiðlarnir hava gjørt av Copson og North Venture Ltd., er m.a. komið fram, at ein av teknisku stjórunum hjá fyritøkuni er virkin limur innan Greenpeace-felagsskapin. Tað verður somuleiðis hildið, at leiðslan hjá Nort Venture Ltd. hevur ávíst tilknýti til henda felagsskap.

Íslendingar meta tað eisini at vera ógvuliga ivasamt, at bretski ídnaðurin fer at líta á orkukeldu — í hesum føri ein leidning á havsbotni — sum kann kappast sundur uttan stórvegis trupulleikar og lemja stórar partar av bretska samfelagnum og bretska ídnaðinum.

Copson hevur longu havt samráðingar við íslendskar serfrøðingar, íslendsku sendistovuna í London og stjóran hjá Landsvirkjun, og í næsta mánaði kemur hann til Íslands at samráðast við íslendsku orkumyndugleikarnar.

Ger fyritøkan álvara av at keypa ravmagn úr Íslandi, skal undirsjóvarleidningur leggjast úr Íslandi til Føroya og haðani til Skotlands. Eitt tílíkt projekt fer at kosta astronomiskar upphæddir, møguliga fleiri tíggjutals milliardir kr.

Copson sigur, at við nýggjari tekniskari menning, m.a. sonevndum »superleiðarum«, er hetta nústaðni ikki bert møguligt, men tann einasta gongda leiðin at útvega bretska ídnaðinum bíliga og dálkingarfría orku. Verður undirsjóvarkaðalin nakrantíð lagdur, verður hann longsti ravmagnsleiðarin í heiminum. Undirsjóvarkaðalar, sum flyta ravmagn, eru longu lagdir aðrastaðni, t.d. millum Frakland og Ongland, og millum oyggjar í Hawaii, har fjarstøðan er stór og sjóvardýpið ofta meira enn 2000 metrar. Serliga tær royndir, gjørdar eru í Hawaii vísa, at tað ber til at leiða ravmagn í undirsjóvarkaðalum, hóast stórar fjarstøður og stórt dýpi. Spurningurin skuldi, ið hvussu so er verið áhugaverdur fyri føroyingar, sum kundu nøktað tað mesta av sínum orkutørvi við at keypa bert evarska lítið petti burturúr tí gigantisku orkunøgdini, North Venture Ltd. tykist sinnað at flyta úr Íslandi.

etj.-

Í 1979 reisti Tórmóður Dahl spurningin um at fáa elorku úr Íslandi via kaðal



Leysasølu 3,00

sosialurin

frælsi
javnaður – bróðralag

Nr. 56 — Leygardagur 21. juli 1979

Bíðað í sjey ár eftir byggiloyvi

Lesið inni í blaðnum.

Sumbingur skoraði 3 mál fyri Norðurlond

lesið á baksíðuni

Føroyar kunnu fáa elorkuna gjøgnum kaðal úr Íslandi

Fer at kosta minni enn SEV-útbyggingin

Føroyingar kunnu nøkta framtíðar elorkutørvin við at keypa elorkuna frá íslendingum. Hetta kann vera gjørt við at leggja ein kaðal á havbotnin millum Føroyar og Ísland

Soleiðis segði Tormóður Dahl í sínum uppleggi á panelfundinum um orku og umhvørvi. Fundurin varð hildin á Debesartrøð hóskvøldið.

Salurin var stúgvandi fullur av fólki.

Umframt Tormóð Dahl hildu Finnur Lützen og Eyðfinn Egholm fyrilestrar um orkuspurningin og dálking í hesum sambandi. SEV-stjórin Hjalgrim Winther bevði eisini eitt innlegg.

Tormóður Dahl spurdi, hví tann møguleikin, at leggja kaðal millum Føroyar og Ísland, ongantíð hevur verið havdur á lofti. Hann helt, at hesin møguleiki átti at verið kannaður, og hevði hann eisini sjálvur roynt at kanna málið. Úrslitið av hesum kanningum er, at tað kann loysa seg hjá okkum at leggja ein kaðal til Íslands. Kostnaðurin av hesi útbygging verður 350 mill. kr. og fer at geva okkum 60 MW — 360 GWh/ár.

Tormóður segði víðari, at um 2 til 3 ár, tá hesin kaðal vónandi er veruleiki og í høvuðsheitum fíggjaður gjøgnum Nordisk Investeringsbank — vil elorkutørvur okkara vera okkurt um 160 mill. kWh. Í dag geva okkara egnu vatnkraftverk um 50 mill. kWh, og verður sostatt møguliga nettoyvirskotið úr Íslandi 250 mill. kWh. Verður hetta yvirskot nýtt til upphitingarendamál via hitapumpum fáa vit sum kunnugt umleið 3 ferðir so nógv burtur úr elorkuni — heita golfstreyminum fyri at takka.

Tormóður Dahl visti tó á, at neyðugt verður eisini at byggja eitt kolakraftverk, tí fyrr ella seinni verður kraft av íslendingum, at vit skulu kunna flyta nakað av elmegi til teirra.

Tormóður Dahl hevur tosað við íslendskar orkumyndugleikar um spurningin. Tað vísir seg, at Ísland hevur stóran áhuga fyri at selja elmegi til Føroyar og í heila tikið at selja elmegi til onnur lond.

Fyri nøkrum árum síðani vórðu kanningar gjørdar at leggja ein elkaðal frá Skotlandi til Íslands, men hetta projeltið datt niðurfyri, tí teknologiin var komin ov stutt áleiðis á hesum øki. Nú hava danir og norðmenn lagt ein kaðal yvir Skagerak, so nú eigur møguleikin at leggja kaðal millum Ísland og Føroyar at verða umhugsaður, segði Tormóður Dahl.

Frá orkufundinum hóskvøldið. Sjáldan hava so nógv fólk leitað sær út á Debesartrøð sum hetta kvøldið

400 km · 220 kv-kaðal
60 MW · 360 GW h/ár
kostnaður:
350 mill. kr.

Dýrari at senda brøv

síða 5

Í amboðshandlinum
»AMBOÐ«
í Varðagøtu 30
fáa tygum m.a.:

Allar
Metabo
maskinur

Øll
STAHLWILLE
amboð

Allar støddir av
skeri- og slípiskivum.
Gevindtappar og
gevindbakkar, bæði
í isometrisk og
rørgevind í HSS
og VS.

BAHCO
Stjørnulyklar, tengur,
rørtengur og stikkur
o.m.a.

RIDGID
Gevindskerimaskinur,
bukkimaskinur,
bukkitengur, holsagir,
rørknivar o.m.a.

f.f.luft
KOMPRESSARAR

KÄRCHER
Trykkspularar,
55 bar - 170 bar

Bonkborimaskinur
Bonkslípimaskinur
Borir til jarn, timbur,
betong, rustfritt stál.
Vognhjól, fleiri støddir.
Taljur, dynkraftir, stikkstál og dreyguplattar.

Keyp har tygum fáa
mest fyri peningin

TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/ Tummas Andreasen
Varðagøtu 30
100 Tórshavn
TLF. 13442

HVALVÍK
glasfipur bátar

Nú er tíð at bílegja bátin til komandi summar.

Vit hava stórt úrval.
Hvalvik 17' - 35' fóts.

Vit umboða útgerð til fiski- og alivinnu.

Lagalig fígging.

P/F FAROE MARINE
FR-430 Hvalvík
Tlf.: 22460
Fax: 22466